# Foreldrasamstarv

- Vit leggja stóran dent á at hava eitt gott foreldrasamstarv.
Hetta skapar tryggleika, bæði hjá børnum og foreldum.
- Við at hava eitt gott og opið samstarv við foreldrini, menna vit okkara námsfrøðiliga arbeiði.
- Vit hava kontaktpersónar, fyri hvønn flokk, ið foreldrini kunnu seta seg í samráð/samband við.
- Vit hava eitt foreldraráð, ið er bindilið millum frítíðarskúlan, starvsfólk og foreldur.
- Vit hava informerandi foreldrafundir gjøgnum árið, tá tørvur er á tí.

# Persónligir førleikar

**Mál:**
• At styrkja sjálvsvirðið og sjálvsálitið hjá barninum
• At barnið verður sjálvhjálpi/sjálvstøðugt
• At barnið verður hoyrt og sætt
• At barnið kennir egin mørk, og dugir at siga frá
• At taka støði í tí einstaka barninum og styrkja tess persónligu eginleikar

**Tiltak:**
• Børnini mynda teirra egna gerandisdag í frítíðarskúlanum
• Vit hjálpa børnunum at halda fast í teirra vali, t.d. at fara á bókasavnið, listaskálan o.t.
• Børnini skulu vera við til at loysa ósemjur í gerandisdegnum
• Vit lurta og eygleiða børnini í gerandisdegnum
• At starvsfólkini eru nærverandi og lurtandi yvir fyri barninum, bæði verbalt og nonverbalt
• Vit møta barninum á ein jaligan hátt
• Vit vaksnu eru týðilig, í tí vit siga
• Vit styrkja førleikarnar hjá børnunum
• Vit stuðla børnunum, við teirra kenslum, bæði tá tey eru kedd og glað
• Vit leggja stóran dent á at nevna børnini við navni
Tekin:
• Vit lurta og eygleiða børnini í gerandisdegnum
• Síggja um børnini trívast í frítíðarskúlanum

# Sosialir førleikar

**Mál:**

- At skilja sosialar spælireglar
- Børnini læra at lurta eftir hvørjum øðrum
- At øll verða vird og hoyrd
- At kenna seg væl og hoyra til felagsskapin
- At læra børnini empati
- Vit leggja dent á, at børnini sjálvi loysa ósemjur
- At børnini góðtaka, at øll eru ymisk

**Tiltak:**

- Vit møta og tosa við børnini á ein jaligan hátt
- Vit vaksnu eru fyrimyndir
- Vit vaksnu eru tilvitaði um, at vit eru fyrimyndir bæði empatiskt og sympatiskt
- Vit stuðla børnunum at vera ein partur av felagsskapinum/ bólkinum
- Vit læra børnini bæði at tapa og vinna
- Vit læra børnini um spælireglar
- Gjøgnum spæl kunnu børnini læra at samarbeiða, og harvið læra at virða og skilja hvønn annan
- Vit eru opin og tosa um okkara ymiskleika
- Vit eru opin um, at vit eru ymisk
- Vit tosa við børnini og vegleiða teimum at loysa ósemjur

**Tekin:**

- Vit lurta og eygleiða børnini í gerandisdegnum
- At børnini trívast og mennast í teimum karmum, stovnurin hevur.

# Skapandi evni

**Mál:**
• At menna tey skapandi evnini hjá einstaka barninum
• Børnini læra at kenna ymiskar útrykksformar
• Børnini menna egnu útrykksformar
• Børnini fáa møguleika at vera skapandi

**Tiltak:**
• Vit geva barninum rúm at nýta tess skapandi evni, og at nýta tess hugflog
• Vit hava bæði skipað og óskipað virksemi
• Vit geva barninum tíð og rúm til at skapa, og undra seg
• Vit lurta eftir ynskjunum hjá einkulta barninum
• Vit hava verkstøð við nógvum ymiskum tilfari
• Vit leggja stóran dent á at arbeiða við ymiskum evnum, í sambandi við tær ymisku árstíðirnar og høgtíðirnar

**Tekin:**
• Vit eygleiða, hvat barnið er upptikið av, og fylgja áhuganum hjá barninum
• Verkini hjá børnunum vera víst fram gjøgnum alt árið á frítíðarskúlanum

# Heilsa og rørsla

**Mál:**

• At menna sansir og motorik
• At børnini læra kropp og sansir at kenna
• At børnini læra ymisk ítróttartiltøk
• At læra børnini ymisk rørslu spøl, bæði úti og inni

**Tiltak:**

• Vit bjóða tónleikaspøl t.d. dansispøl, sangspøl o.s.fr.
• Vit bjóða bóltspøl t.d. fótbólt, rundbólt og stikbólt o.s.fr.
• Vit svimja eina ferð um vikuna, har vit gera ymisk spøl og rørslur.
• Vit bjóða rørsluspøl, bæði grov- og fínt motorisk t.d. hoppa band, koyra mánabil, wresling, sansibana o.s.fr.
• Vit hava ymiskar kappingar í frítíðarskúlum
• Vit bjóða eisini øðrum frítíðarskúlum til kappingar
• Vit hava høllina hvønn dag, har børnini hava møguleika til spæl og rørslu
• Vit liggja á einum ítróttaøki, har vit hava góðar møguleikar til uttandura rørslur og spæl
• Vit leggja stóran dent á frítt spæl, men vit hava eisini skipað spæl uttandura.
• Vit hava eitt púturúm/sansirúm
• Børnini ganga niðan í frítíðarskúlan hvønn dag
• Sí meira á „náttúru“

**Tekin:**

• Vit eygleiða børnini í gerandisdegnum.

# Mál og samskifti

**Mál:**
• Børnini skulu skilja og tosa rætt føroyskt
• Børnini skulu læra at avlesa kropsmál og andlitsbrøgd
• Børnini skulu samskifta við virðing fyri hvørjum øðrum
• Vit leggja stóran dent á at læra børnini at vanda sær um málið
• At fyribyrgja happing

**Tiltak:**
• Í gerandisdegnum, stuðla vit børnunum at tosa rætt føroyskt
• Í spælinum leggja vit dent á, at børnini spæla saman og spyrja um tey kunnu sleppa uppí og at virða hvønn annan
• Vit tosa nógv við børnini, lurta eftir teimum og stuðla teimum í tí, tey hava at siga
• Vit stuðla børnunum at duga at siga til og frá og hví
Tekin:
• Børn og starvsfólk trívast
• At happing ikki fer fram á stovninum

# Náttúra og umhvørvi

**Mál:**

• Børnini verða tilvitað um náttúruna og umhvørvið
• Børnini læra um árstíðir, djór og plantulív
• Børnini fáa virðing fyri náttúruni og umhvørvinum

**Tiltak:**

• Tá vit eru á útferðum, fortelja vit um náttúruna og onkuntíð fáa vit servitan útifrá til at siga frá.
• Vit nýta nærumhvørvið og annars onnur støð í Tórshavnar kommunu, við at fara túrar á Skansan, Hvítanes, Sandágerð, Náttúrugripasavnið, ganga í fjøllunum, o.s.fr.
• Vit nýta náttúruna til spøl, t.v.s. bóltspæl, krógva og blunda, o.s.fr. Vit leggja stóran dent á frítt spæl.
• Vit nýta náttúruna til at samla tilfar, t.d. bløð, grann, grannkoglir, blómur, vit fiska o.s.fr.
• Í gerandisdegnum siga vit frá teimum ymisku djórunum og plantunum, t.d. tá lombini koma, blómurnar o.s.fr. Vit geva børnunum tíð til at undrast á náttúruna. Vit planta urtapottar, seta eplir niður osv. Vit leggja dent á at læra børnini um umhvørvið, við at arbeiða við teim tilskilaðu evnunum í umhvørvisvikuni, ið Tórshavnar kommuna skipar fyri. Hetta gera vit, við at leita okkum vitan frá serkønum fólki, t.d. á brennistøðini á Sandvíkahjalla.
• Vit hava bálpláss og møguleika fyri at byggja smáttur á frí økinum við frítíðarskúlan.
• Vit gera mat frá náttúruni og í náttúruni, t.d. sneisabreyð og grilla.
• Vit hugna okkum í náttúruni, t.d. við at eta matpakka/ millummáltíð, syngja o.s.fr.
• Starvsfólkini fáa íblástur frá ymiskum bókmentum og hugskot frá foreldrum.

**Tekin:**

• Við at eygleiða, hvussu børnini fara um nattúruna, síggja vit um børnini eru tilvitað um, og hava virðing fyri náttúruni.
• Vit hava spurnakappingar, har vit seta børnunum spurningar um náttúruna, t.d. plantur, djór, um hvussu vit ferðast í náttúruni o.s.fr.

# Siðir og mentan

**Mál:**
• At børnini læra um føroysku mentanina
• At børnini læra um høgtíðir
• At stovnurin hevur sínar egnu siðir

**Tiltak:**
• Vit geva børnunum innlit í týdningin, tað hevur at varðveita ta føroysku mentanina
• Vit læra børnini um árstíðir og um tær ymisku høgtíðirnar
16
• Stovnurin arbeiðir við at fáa sínar egnu siðir
• Í samband við námsætlanina, eru vit í ferð við at gera eina náttúrumappu, skapandi virksemismappu og eina ítróttamappu, har ymisk uppskot eru til siðir og mentan
• Les eisini 'Náttúra og Umhvørvi' og 'Skapandi Evni'

**Dokumentation**

Fyri at vita um vit fylgja málunum í námsætlanini, er neyðugt at dokumentera og eftirmeta arbeiðið á stovninum. Hetta gera vit við at hanga myndir og annað, sum børnini hava gjørt, upp á stovninum, og tosa við børnini um tað, ið tey hava gjørt.
Somuleiðis hava vit ein facebook bólk, har myndir av børnunum verða lagdar inn á.